# 1st Suðuroy International

**Suðuroyggin verður av álvara sparkað inn aftur í føroyska talvheimin, tá sterk IM-kapping fer av bakkastokki á Tvøroyri komandi vikuskiftið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Enn einaferð er tað Rani Nolsøe, ið er høvuðsmaður aftanfyri stór talvtiltøk. Atljóða talvdómarin og talvlærarin hjá børnunum á Sandoynni, Mogens Nielsen, hevur aftur í ár veitt Rana eina góða og effektiva hjálpandi hond. Millum annað við at finna fram útlendsku telvararnar. Mogens verður eisini dómari í kappingini.

Fyri stuttari tíð síðani fekk Rani hugskotið at hava eina IM-kapping í Suðuroy. Oyggin hevur ligið í talvdvala síðani Sumbiar Talvfelag datt niðurfyri fyri umleið seks árum síðani. Talvfelagið sunnast í Føroyum varð sett á stovn í 1993 og framanundan hevði einki talvfelag verið í Suðuroy í fleiri áratíggir.

Tí helt Rani, at tíðin var komin at fáa suðringar at lata eyguni upp aftur fyri áhugaverdu heilaítróttini. Spennandi verður at vita um kappingin fer at skapa áhuga í oynni.

### Ung kvinna við

Tá fíggingin varð komin upp á pláss, fór Mogens í holtur við at finna tittultelvarar í grannalondum okkara. Eftir stutta tíð vórðu allir tíggju telvararnir funnir. Fýra útlendingar og seks føroyingar.

Tíverri komu nøkur avboð, men maður kemur jú í mans stað. Í einum føri kom tó ein ung kvinna í mans stað, nevnliga 22 ára gamla atljóða kvinnuligi meistarin Oksana Vovk úr Danmark.

### Góðar vónir

IM John Shaw, sum vit kenna frá FM 2003 í Havn, er ein av útlendsku gestunum. Shaw og IM Emil Hermansson eru helst favorittar at vinna á Tvøroyri.

John Arni Nilssen vitjar aftur á klettunum. Seinast hann telvaði í føroyum var á heysti 2002, tá føroyski eittarin luttók í 1st Klaksvík International. John Arni hevur mangan víst at hann telvar sum ein sterkur altjóða meistari.

Rani og Mogens meta vónirnar vera serliga góðar fyri John Arna at vinna sær sín triðja og seinasta IM-norm á Tvøroyri. Til hetta krevst 6,5 stig av 9 møguligum,

Heini Olsen, Martin Poulsen og Flóvin Tór Næs fingu innbjóðing, men teir høvdu ikki stundir at luttaka á hesum sinni. Í teirra stað vera Hans Kristian Simonsen, Ólavur Simonsen og ungi tvøroyramaðurin Sjúrður Thorsteinsson. Stjørnuskotið frá FM á Oyrarbakka, Helgi D. Ziska, fekk innbjóðing, men mátti geva avboð. Tí sleppur Sjúrður at royna seg á heimavølli.

John Rødgaard, sum heldur til á Tvøroyri, hevur telvað væl hetta seinasta árið og góðir møguleikar eru uttan iva hjá honum at blanda seg í oddastríðið.

Kappingin verður í døgunum 18 - 25. juni. Upprunaliga varð ætlanin at skúlin í Trongisvági skuldi hýsa kappingina, men telvað verður í staðin í skúlanum á Tvøroyri. Tíggjunda og seinasta umfar verður á sjálvari Jóansøku.

Vinnarin av 1st Suðuroy International fær 5000 krónur. Nr. 2 og 3 fáa ávíkavist 3000 kr. og 1500 kr.

Klaksvík International kappingarnar, sum Rani seinastu árini hevur skipað fyri, eru ikki farnar í gloymibókini. Als ikki. Arbeitt verður við at hava 4th Klaksvík International nú komandi heyst.

**1st Suðuroy International**

Luttakaralistin

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | IM | Shaw John | 2462 |
| 2 | IM | Hermansson Emil | 2454 |
| 3 | IM | Nilssen John Arni | 2432 |
| 4 | FM | Rødgaard John | 2372 |
| 5 | FM | Glud Jacob Vang | 2319 |
| 6 | | Simonsen Hans Kristian | 2317 |
| 7 | | Simonsen Ólavur | 2254 |
| 8 | | Samuelsen Carl Eli Nolsøe | 2238 |
| 9 | WIM | Vovk Oksana | 2122 |
| 10 | | Thorsteinsson Sjúrður | (2100) |

## Talvið hesa vikuna

Indiski superstórmeistarin, Viswanathan Anand, vann sunnudagin eina kvikkapping í Leon, Spania. Í hálvfinaluni vann hann trygt á 14 ára norska undurbarninum og stórmeistaranum Magnus Carlsen (2548). Í finaluni fekk Anand harða mótstøðu, men vann loksins 2,5-1,5 á Rustam Kasimdzhanov, sum í hálvfinaluni hevði vunnið á Alexei Shirov (2714).

Talvið hesa vikuna er frá seinna talvinum í finaluni.

**Anand,V (2785) - Kasimdzhanov,R (2670)**
18th Rapid Leon ESP 12.06.2005

**1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Rif6 5.Ric3 a6 6.Be3 e6 7.f3 b5 8.Fd2 Ribd7 9.g4** Eingilski varianturin í sisilionsku byrjanini, sum nú á døgum verður nógv spældur millum heimsins bestu **9...h6 10.0-0-0 Bb7 11.h4 b4 12.Ria4 Fa5 13.b3 Ric5 14.a3 Rc8** (14...Rixa4 15.axb4 Fc7 16.bxa4 er eisini møguligt hjá svørtum. Ivasamt er tó hvussu nógv meirfinnan vigar) **15.Fxb4 Fc7 16.Kb1 Rifd7 17.Rib2 d5 18.Fd2 dxe4 19.f4 Rif6 20.Be2 Rid5 21.Ric4 Rid7 22.g5 Rixe3 23.Fxe3 Bd5 24.Rhf1 Bc5 25.Fc3 hxg5 26.Rif5! Bxc4?** Betur hevði verið at tikið riddaran og latið d5-bispin **27.Rixg7+ Ke7 28.Bxc4 Rhg8 29.hxg5 e3 30.f5** Hvítur brýtur ígjøgnum **30...Rie5 31.fxe6 Rxg7**



**Støðumynd eftir 31...Rxg7**

**32.Rd7+! Rixd7 33.Fxg7** Og svartur gavst í vónleysari støðu **1-0**

# 200 m

Á 13 teimum fyrstu olympisku leikunum (frá 776 - 724 fyri Kristi føðing) í gamla Grikkalandi varð einans kappast í einari ítróttargrein. Tað var hon teir kallaðu "Stadion". Hetta var ein kapprenning har teinurin var 600 føtur (192,27 m). Tað sigst at hesar 600 føtur vóru upprunaliga máldar upp av Hercules, eftir at hann hevði fullført tær 12 uppgávurnar sum gjørdu, at hann ikki longur var trælur hjá konginum í Argos. Seinni var tað broytt til eitt stadium, næstan eins og vit kenna tað í dag. Runnið var úr einum enda av økinum (Stadium) yvir í hin. Økið, sum kappast varð á, var upprunaliga eitt planerað øki sum var 212 m langt.

*(heimild: http://www.mediaconcerto.com/olympic/about/index.php)*

200 m er enn tann dag í dag partur av olympisku leikunum. Hendan greinin stendur í dag í skugganum av 100 m og 400 m kappingunum, og verður mest roknað fyri at verða tann greinin, har 400 m og 100 m rennarar kunna møtast og kappast um, hvør er besti sprintarin í heiminum.

**-hz**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Heimsmet | Menn | Michael Johnson | USA | 19,32 sekund |
| Oyggjaleikamet | Menn | Mattias Sunneborn | Gotland | 21,31 sekund |
| Føroyskt met | Menn | Heini Hátún | Bragdið | 23,00 sekund |
| Heimsmet | Kvinnur | Florence Griffith Joyner | USA | 21,34 sekund |
| Oyggjaleikamet | Kvinnur | Cydonie Mothersill | Cayman Islands | 24,44 sekund |
| Føroyskt met | Kvinnur | Margreth Augustinusssen | Vágur | 29,67 sekund |

## Liverpool við í Champions League

Nú er greitt, at Champions League vinnararnir úr Liverpool sleppa at verja heitið.

Aðalstjórnin í UEFA viðgjørdi á fundi fríggjamorgunin, um Liverpool skuldi sleppa at verja Champions League-heitið. Liverpool gjørdist einans nummar fimm í Onglandi og fekk tí bert pláss í UEFA-Cup, men nú avgjørdi aðalstjórnin, at Liverpool skal verða við í Champions League kappingini, sum skjótt fer av bakkastokki.

Liverpool verður við í fyrsta innleiðandi umfarinum, og tað merkir, at føroyameistararnir úr HB hava møguleika at hitta enska stórfelagið.

**-jm**

# Súkkla í Hósvík fríggjadagin

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Kappsúkklingin á Sundalagsstevnuni í Hósvík verður fríggjakvøldið klokkan 19:00. Tað er Tórshavnar súkklufelag, sum skipar fyri kappingini. Kappingin er bert fyri unglingar og vaksin. Eingin barnasúkkling verður, tí mett er at trygdin til barnasúkkling, meðan stevnan er, er ikki nóg góð.

Startur og mál er á landsvegnum í Hósvík. Súkklast skal úr Hósvík, eftir landsvegnum fram við Streymnesi, um Brúnna við streymin og niðan til rundkoyringina omanfyri Norðskála, har verður vent og síðan skal súkklast sama veg aftur til Hósvíkar, teinurin er umleið 22 km. langur.

Fyrsti súkklarin byrjar klokkan 19:00, síðan verða hinir sendir avstað, við 2 minuttum ímillum hvønn.

Medaljur verða lætnar trimum teimum skjótastu súkklarunum samanlagt, trimum teimum bestu undir 18 ár og teimum trimum bestu yvir 45 ár. Tað vil siga at teir undir 18 ár og yvir 45 ár, kunnu vinna 2 medaljur, bæði medaljur í sínum bólki og medaljur fyri at súkkla skjótast samanlagt!

Øll eru vælkomin at verða við, treytin er at góður súkkluhjálmur verður brúktur og at súkklan er í rímiligum standi, best er at allir luttakararnir eru møttir áðrenn kl. 18:30, komandi fríggjakvøld.